## Mugu finna nýggjar vinnuvegir

Tað er greitt, at veðurlagsbroytingarnar fara at fáa stóra ávirkan á nógv viðurskifti í Grønlandi. Millum annað fara broytingarnar at ávirka umstøðurnar hjá veiðimonnunum. Á einari veðurlagsráðstevnu í Keypmannahavn í síðstu viku segði landsstýrismaðurin í vinnumálum, Siverth K. Heilmann, at politikarar, veiðimenn, fiskimenn og vinnuvirkini á landi eiga at hava eygu og oyru opin fyri at fáa staðfrest, hvørjir fyrimunir kunnu fáast burtur úr broytingunum. Landsstýrismaðurin segði, at tað er serliga neyðugt at útvega veiðimonnunum í Landnyrðingsgrønlandi aðra vinnu og um neyðugt uppi á landi.



*Siverth K. Heilmann er grønlendskur landsstýrismaður í vinnumálum (Mynd: Sermitsiaq)*

# Finn tín innara risa

**Coachguruin Anthony Robbins helt herfyri ein fyrilestur í Århus um vinnaramentalitet**

FYRILESTUR
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*
*be@implementer.dk*

Leygarkvøld í stadionhøllini í Århus stendur ein maður í samfullar 5 tímar á pallinum og talar til fólkið. Áhoyrarnir rópa, hoppa, dansa, játta og geyla, tá leiðarin gevur boð um tað. Ivist eina løtu í um eg eri endaður í einum Moon business seminari ella onkrum øðrum nýátrúnaðarligum amerikanskum fjasi, nú hetta leygarkvøld er bílagt fimm tímar seminar við manninum, sum verður mettur at verða heimsins besti coach, nevniliga amerikumaðurin Anthony Robbins. Áhoyrarar eru vinnulívsfólk og leiðarar.

### Coaching

Coaching er vorðið eitt gandaorð. Júst sum nýggjar telduskipanir, so kann coaching loysa allar trupulleikar sum virki og stovnar hava. Hetta tykist at verða ein yvirskipað mynd av hugtakinum, men so einfaldur er sannleikin neyvan. Seinnu árini hevur størri dentur verið lagdur á starvsfólkatrivnað og viðurskiftið. Í hesum tíðum við stórum eftirspurningi eftir arbeiðsorku, verður enn størri dentur lagdur á at menna tey starvsfólkini ein hevur.

### Einstaklingurin

Vit hoyra ofta útsagnir um, at okkara vestligu samfeløg gerast støðugt meira individuel, einstaklingurin hugsar bert um seg sjálvan og síni mál og nýtsla er í hásæti. Mitt í hesum meldrinum er coaching, persónliga og einstaka menningin. Júst hetta fyribrygdi lýsir kanska í veruleikanum dagligu mótsetningarnar vit hava í okkara vestligu samfeløgum. Tøkni, vitan, trygd og høgt lívistøði hevur helst skúgva átrúnaðin til síðis og hóast vit ikki vilja verða við tað, so stendur eitt tómrúm eftir, tí arbeiði og ein sjálvur er sjálvdan nokk til eitt heilt lívsinnihald. Persónlig menning er neyðugt men ikki nóg mikið.

### Robbins on stage

Lat tað verða sagt beinanvegin, at Robbins er ein ótrúligur røðari og undirhaldari. Coachingshowið hetta kvøldið er ein maður á palli, og 2000 áhoyrarar í 4-5 tímar. Tað eigur næstan ikki at bera til, men hann er eisini ørvísi. Alt kvøldið brúkti hann persónligar søgur og hvussu hann hevur lært frá øðrum. Eitt coaching skeið leggur sjálvandi luppin á tað sum skal broytast. Hann byrjaði beinanvegin at við at geva okkara siðbundnu skúlaskipan við skúlaflokki, og at seta børn kúrr banaorð, og at henda skúlaskipan er beinleiðis orsøkin til at vit eru so bangin fyri broytingum. Við vísindaligum grundgevingum um at fólk bert minnast ein brøkpart av tí tey fáa sum passiva vitan, altso tá tey sita og lurta, kanska helvtina tá tey skriva niður so er innlæringin munandi betri tá fólk eru við og luttaka í tilgongdini. Tí krevur eitt seminar við Robbins, at hoppað verður fyri at fáa blóðrenslið í gongd, geylar sum tá Føroyar skoraði ímóti Eysturríki í Landskrona, dansar og annars brúkar kropsmál og stuttar venjingar saman við fremmandi fólki. Tað handlar um at tora, at bróta mørk og at vilja, tí sum hann sigur, tað krevur dirvi at bróta burtur úr nýggjum.

Hesar 5 tímarnir fær Robbins áhoyraran við inn í sítt univers, við einføldum dømum. Hansara boðskapur er, at fyri at menna teg mást tú finna fram til hvar tú ert í lívinum og hvagar tú vilt. Fyri at fáa eitt úrslit, má tann einstaki erligani finna fram til hvat ikki er nøktandi og hvat er nøktandi í lívinum. Síðani er neyðugt er at finna fram til hvørjar raðfestingar og mál ein hevur, tí størsta orsøkin til ónøgdsemi er, at samanhangur ikki er millum miðil, mál og raðfestingar.



*Robbins vil hava vinnaran fram í tær*

### 6 virðir

Fyri at finna fram til raðfestingarnar arbeiðir Robbins við seks grundleggjandi menniskjaligum tørvum, sum eru at finna kring allan heim hesi eru:

- Vissa ( At leggja stóran týdning á at hava tamarhald á øllum)
- Óvissa /fjølbroytni (óvissa fyri at kenna lívið)
- At hava týdning (at ein hevur týdning fyri onnur/samfelag)
- Kærleiki og samband við fólk (at elska/verða elskað(ur), vinsemi, samband við fólk)
- Framburður (at leggja stóran dent á framburð í lívinum)
- At geva (Gleðast við at geva øðrum)

Úr hesum virðum, skal tann einstaki velja tvey, sum hava størsta týdningin og síðani seta sær mál í trá við tey virðini.

### Taka egna ábyrgd

Hetta kann ljóða ógvuliga einfalt og sum ein sjálvfylgja, men tað er coaching. Coaching og serliga sum Robbins brúka coaching, ræður um at finna innaru styrkina hjá tí einstaka. Men grundleggjandi er eisini, at tann einstaki tekur ábyrgd fyri sær sjálvum, at einstaklingurin ikki gevur ytri umstøðum skuldina fyri umstøður, sum ikki eru nøktandi. Her ræður um at finna fram til hvat ikki er nøktandi, hvørjar broytingar eru neyðugar og síðani seta sær eina ætlan fyri at náa hesum máli. Styrkin hjá Robbins er, at hansara arbeiðsháttur er sera einfaldur og tekur støðið í at tú mást læra teg at hava rætta hugburðin, og at finna henda hugburðin fram, tá avrikast skal. At seta luppin á hvat ein vil, og ikki á hvat ein ikki vil, og at gera sær ein amboðskassa, at finna fram neyðuga hjálp og altíð brúka orku til at leita sær ráð frá teimum bestu soleiðis:

**Work hard**
Framburður krevur krúthart arbeiði og veruligi framburðurin kemur ikki fyrr enn farið verður so langt at tað merkist (fær ilt). Vilt tú nakað her í lívinum skalt tú eisini gjalda kostnaðin fyri stríðið.

**Learn from everybody**
Tað er ógvulig umráðandi at læra frá øllum, og at finna sær ráð frá teimum bestu á økinum.

**Fall in love and apricate**
At elska tað man tekst við, og virðismeta tað man hevur.

### Handilsparturin

Tað er eingin ivi um, at Anthony Robbins eisini er vinna, og at hann vinnur nógvan pening. Undan og eftir tiltakið ber til at keypa alskins vørur í Anthony Robbins vinnuleistinum, eins og hann tilmælir fólki til at brúka coaching í sínum fyrilestrum, samstundis sum hann hevur samstarv við coaching fyritøkur í samband við fyrilestrar kring heimin. Hann ger heldur einki fyri at fjala, at hetta eisini snýr seg um



*Robbins hevur m.a hjálpt Andre Agassi við at koma uppaftur á tennistoppin*



*Hann er sum ein tónleikastjórna*